Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í samferðslumálum

Evni: Asfaltering í Fugloynni

Spurningar:

1. Hvørjar ætlanir eru um at asfaltera vegin millum Hattarvík og Kirkju?
2. Hvørjar ætlanir eru um at gera nýggja bilverju á vegnum millum Hattarvík og Kirkju?
3. Hvørjar ætlanir eru um at bøta um lendingina í Hattarvík og á Kirkju?

Viðmerkingar:
Vegurin millum Hattarvík og Kirkju er illa farin og treingir til ábøtur. Í støðum er bilverjan eisini burtur, tí hon er illa farin. Talan er bara um einar fimm kilometrar, og tí átti ikki at verið so kostnaðarmikið at asfalterað og gjørt bilverjuna aftur.
Á fíggjarlógini er peningur fleiri ferðir játtaður til lendingina/havnarlagið í Svínoynni, og tí er áhugavert at vita, hvat fer at verða gjørt í Fugloynni.

Á Løgtingi, 10. august 2022

Beinta Løwe Jacobsen